# Felags fráboðan frá fiskimálaráðharrum Føroya og Íslands

Høgni Hoydal, fiskimálaráðharri og Þorgerður Katrín Gunnarsdóttir, fiskimálaráðharri Íslands og Føroya samráddust í gjár (16. januar) um fiskirættindi hjá føroyingum í íslendskum sjógvi næsta ár. Semja varð eisini gjørd um felags atgongd til veiðu í sjóøkinum hjá hvørjum øðrum. Føroyingar fáa somu rættindi í 2017 sum í 2016, ið eru 5.600 tons, men hámarkið fyri veiðu av toski hækkar úr 1.900 tonsum í 2.400 tons.

Semja varð gjørd um, at føroyingar framhaldandi kunnu veiða lodnu undir Íslandi, sum er 5% av avtalaðari heildarveiðu í veiðitíðarskeiðinum, men tó mest 30.000 tons. Enn eru tó avmarkingar hjá føroyingum at virka lodnu umborð ella at landa í Føroyum til matna. Her varð tó tann broyting gjørd, at eftir 15. februar kunnu framhaldandi 1/3 virkast til matna, men tó í minsta lagi 4.000 tons.

Ongar broytingar vórðu gjørdar í rættindunum hjá Íslandi at veiða 1.300 tons av makreli og 2.000 tons av heystgýtandi sild í føroyskum sjógvi, og ikki heldur viðvíkjandi felags atgongd landanna at veiða svartkjaft og norðhavssild sild í sjóøkinum hjá hvørjum øðrum.

Ráðharrarnir vóru samdir um at halda fram við tingingunum, sum byrjaðu í fjør, um tillagingar í fiskiveiðiviðurskiftunum við atliti at ásetingum Hoyvíkssáttmálanum um handil landanna millum, og at stremba eftir at gera hesar samráðingarnar lidnar innan eitt hálvt ár.

At enda søgdu báðir ráðharrarnir seg vera væl nøgdar við tann góða hugburðin, ið merkti fundin, og gevur hetta eitt vón um meira samstarv millum londini tey næstu árini, báðum pørtum til gagns.